# ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30. august 2022 |
| Mál nr.: | 21/25651-13 |
| Málsviðgjørt: | BÁT/HP |
| Ummælistíð: | 30. aug. til 26. sep. |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a.**
(Hækkan av gjaldi fyri vistarhald, tænastu og heimahjálp)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 126 frá 17. desember 2014 um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a., sum broytt við kunngerð nr. 160 frá 9. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“Stk. 3. Afturat inntøkuni sambært stk. 2 skulu leggjast nettoinntøkur, ið verða skattaðar eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini.”

**2.** § 7 verður orðað soleiðis:
”**§ 7.** Pensjónistur, sum fær uppihald á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli, skal rinda eitt mánaðarligt gjald fyri vistarhald og tænastur.
*Stk. 2.* Vistarhald fevnir um húsaleigu, olju, el, mat, felagsútreiðslur o.t. Tænastur fevnir m.a. um røkt og praktiska hjálp.
*Stk. 3.* Kommunan ásetir hægst møguliga gjald fyri vistarhald og tænastur.”

**3.** § 8 verður orðað soleiðis:
”**§ 8.** Pensjónistur við inntøkugrundarlag upp til 50.000 kr. rindar 54 prosent av hægst møguliga gjaldi sambært § 7, stk. 3. Er inntøkugrundarlagið millum 50.000 kr. og 55.000 kr., rindar pensjónisturin 60 prosent av hægst møguliga gjaldi. Gjaldið hækkar við 0,85 prosentstigum fyri hvørjar 5.000 kr., inntøkugrundarlagið er hægri enn 50.000 kr.”

**4.** § 9, stk. 4 verður orðað soleiðis:
”Gjald fyri umlætting er 40 prosent av hægsta møguliga gjaldi sambært § 7, stk. 3, umroknað til ein dagsprís.”

**5.** § 16, stk. 3-5 verða orðað soleiðis:
”*Stk. 3.* Kommunan ásetir hægst møguliga gjald fyri hvønn tíma fyri heimahjálp.

*Stk. 4*. Hægst møguliga gjald sambært stk. 3 kann ikki vera hægri enn kostnaðurin hjá kommununi at veita heimahjálp.
*Stk. 5*. Pensjónistur við inntøkugrundarlag upp til 50.000 kr. rindar 10 prosent av hægst møguliga gjaldi sambært stk. 3. Er inntøkugrundarlagið millum 50.000 kr. og 55.000 kr., rindar pensjónisturin 25 prosent av hægst møguliga gjaldi sambært stk. 3. Gjaldið hækkar við 1,7 prosentstigum fyri hvørjar 5.000 kr., inntøkugrundarlagið er hægri enn 50.000 kr."

**6.** § 16 a verður orðað soleiðis:

"Kommunan skal almannakunngera gjøldini fyri komandi árið í seinasta lagi 1. desember."

**§ 2**

*Stk. 1*. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2023.
*Stk. 2*. Tey gjøld fyri búpláss, umlætting og heimahjálp, ið vóru galdandi 1. januar 2022, verða framvegis í gildi í teimum kommunum, har nýggj gjøld ikki eru kunngjørd til at galda frá 1. januar 2023.

Almannamálaráðið, 30. august 2022

**Sólvit E. Nolsø**
landsstýrismaður

/ Eyðun M. Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum